# Lat hugflogið reika



**Í heyst gav Bókadeild Føroya Lærarafelag út forvitnisliga og sermerkta bók til børn og ung – ella sum høvundurin sjálvur sigur: til børn í øllum aldrum. Bókin eitur »Apollonia« og listamaður og rithøvundur er Edward Fuglø**

## Umrøða



**Helena Dam á Neystabø**



### Um Edward og myndirnar

Edward Fuglø hevur í nógv ár verið virkin listamaður. Umframt at hann myndprýðir bøkur, ger stórar málningar og listaverk, hevur hann ein serligan tokka til sjónleik og ikki minst til leikhús.

Hetta í leiktjøldum og leikbúnum at skapa ein markleysan heim, eina illusión, sum kortini í sínum óveruleika sigur meira um veruleikan, enn túsund orð, er tað, sum hugtekur Edward.

Í einum viðtal við Bent Rasmussen í 2001 sigur Edward til dømis: "Eg arbeiði við nógvum ymiskum listagreinum, men kortini hongur alt saman. Tað snýr seg um at skapa eina illusión. Eg eri so heppin, at ein ótømandi hópur av myndum og figurum fylgja mær. Mær nýtist ikki at leita eftir motivum, tey eru altíð við hondina". Í Apolloniu sameinar Edward sín áhuga fyri at skapa myndir og sín kærleika til sjónleikin.

Mong vilja siga um Edward, at hansara stílur ikki er serliga føroyskur ella skandinaviskur. Kortini hevur hann sum fáur manað fram í myndum alt tað forniska, sum okkara mentunararvur er so fullur av.

Hansara stílur er meira fabulerandi, fyltur við detajlum og dimmari í ljósi og litum, enn vit eru von við. Tað er ein ovurhonds rúgva av myndevnum, sum troka á, og sum vilja sleppa á løriftið. Man kann siga, at hansara stílur er gróðrarmikil og kvæmur, og als ikki minimalistiskur og einfaldur.

Vandin er tá, at man vil ov nógv, og at skreytið doyvir boðskapin og listarliga úttrykkið.

Eg haldi, at Edward Fuglø í bókini Apolloniu hevur dugað at finna eina hóskandi javnvág við nógvum stuttligum detaljum. Myndirnar í Apolloniu fara tvørturum heilar opnur sum pallmyndir. Teksturin verður sum eitt leikrit sett inn í pallmyndina. Eg haldi, at tað er harmiligt, at týðandi partur av heildarmyndini við hvørt hvørvur inn í miðjuna á bókini. Til dømis á síðu 26 og 27, har Machbeth kongur so at siga endar millum tvær síður.

### Í Havn – og kortini ikki

Tú kennir myndavalið aftur. Vit eru í Havn og í Sjónleikarahúsinum. Til hetta høvið er standmyndin av Hans Andriasi broytt til eina standmynd av Shakespeare.

Til tess at skapa ein óveruligan og fiktivan stemning, eru fleiri av myndunum eins og spegladar í einum rundum spegli. Á tann hátt leggur listamaðurin eitt eyka filtur inn millum søgu, søguna í søguni, pallmyndina og so lesaran. Og vit kunnu aftur seta tann stóra og klassiska spurningin hjá heimsspekini. Er veruleikin tað sum vit síggja, ella er veruleikin tann hugmynd, sum vit gera okkum av veruleikanum?

### Um søguna

Í Apolloniu setur Edward Fulgø Shakespeare á pall gjøgnum hugaheimin hjá einari gamlari garderobukonu, sum í ein mansaldur hevur umvalt og seymað leikbúnar í Leikhúsinum.

Edward Fuglø sigur, at tað í einum og hvørjum leikhúsi kring heimin finnast tílíkar forfjónaðar





*Nakrar av tekningunum hjá Edwardi Fuglø í nýggju bókini*